Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	7. mars 2023
Mál nr.:	23/02454-6
Málsviðgjørt:	HP
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	28.02.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti
(Hjálparískoyti til húski og hækking av familjuískoyti í 2023)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 og løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 a verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Hjálparískoyti kann veitast til húski, ið lúka treytirnar í hesi løgtingslóg."
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

2. Í § 1 a, stk. 2, sum verður stk. 3, verður aftan á "oljuískoyti" sett: "ella hjálparískoyti".

3. Aftan á § 2 b verður sett:

"**§ 2 c.** Hjálparískoyti sambært § 1 a er 12.000 kr. í 2023 og kann útgjaldast eina ferð.
Stk. 2. Húski, ið telur ein vaksnan, sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag 290.000 kr., kann fáa hjálparískoyti.
Stk. 3. Húski, ið telur tvey ella fleiri vaksin, har inntøkugrundarlagið í mesta lagi er 440.000 kr., kann fáa hjálparískoyti.

§ 2 d. Í tíðarskeiðinum 1. juni 2023 til 31. desember 2023 hækkar familjuískoyti sambært § 2 við 750 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið."

4. § 4 a verður orðað soleiðis:

"**§ 4 a.** Í sambandi við oljuískoyti og hjálparískoyti skal inntøka hjá øllum vaksnum persónum í húskinum roknast við í inntøkugrundarlagið.

Stk. 2. Inntøkugrundarlagið, sum oljuískoyti og hjálparískoyti er grundað á, er inntøkan nevnd í § 7, stk. 1 og 3.
Stk. 3. Fyri A-inntøku er inntøkutíðarskeiðið, sum oljuískoyti og hjálparískoyti verður grundað á, inntøkan seinastu 12 mánaðirnar. Fyri B-inntøku og vinning sambært kapitalvinningsskattalógini er inntøkutíðarskeiðið, ið oljuískoyti og hjálparískoyti verður grundað á, inntøkan seinasta álíknaða inntøkuár.
Stk. 4. Sum skjalprógv fyri inntøkur sambært stk. 1 verða nýttar eitt nú uppgjørdar sjálvuppgávur og endauppgerðir frá TAKS, kontoavrit frá fyribilsskattaskránni hjá TAKS, váttan frá Studna ella útlendskum stuðulsveitara um lestrarstuðul."

5. § 8 a verður orðað soleiðis:

"**§ 8 a.** Umsókn um oljuískoyti ella hjálparískoyti skal latast Almannaverkinum. Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um oljuískoyti ella hjálparískoyti.
Stk. 2. Umsókn um oljuískoyti skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 30. november 2022.
Stk. 3. Umsókn um hjálparískoyti skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 30. juni 2023.
Stk. 4. Almannaverkið kann útvega sær upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um oljuískoyti ella hjálparískoyti frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi, ið hava kunnleika til viðurskiftini.
Stk. 5. Oljuískoyti og hjálparískoyti verður útgoldið sum ein upphædd til ein persón í húskinum."

6. Í § 10 a verður aftan á "oljuískoyti" sett: "ella hjálparískoyti".

7. Í § 11 a, stk. 1 og 2 verður aftan á "Oljuískoyti" sett: "og hjálparískoyti".

8. Í § 11 a verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Persónur upp til 23 ár, sum sambært fólkayvirlitinum er skrásettur at búgva saman við einum ella báðum foreldrum, kann eiga upp til 50.000 kr., sum ikki verður roknað sum ogn."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Sambært samgonguskjalinum er ætlanin at lætta um gerandisdagin við ítøkiligari hjálp til sperdar familjur. Hækkingin í prístalinum hevur síðsta árið verið óvanliga stór, og gongdin sær út til at fara at halda fram eina tíð aftrat. Príshækkingarnar raka breitt og ymiskt og ávirka fíggjarligu umstøðurnar hjá flestu húskjum. Men tað er munur á, hvussu húski eru før fyri at standa ímóti príshækkingunum.

Húski, sum eru bundin at útreiðslum, og sum hava lágar inntøkur, hava avmarkaðar møguleikar at tillaga seg, og tí fer landsstýrið at veita eina hjálpandi hond til tey, sum eru ringast fyri. Endamálið við hesum uppskoti er sostatt at minka um ringastu avleiðingarnar av prísvøkstrinum, og við uppskotinum verður veittur fíggjarligur stuðul til húski við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi.

1.2. Galdandi lóggáva

Flest allar almannaveitingar eru beinleiðis tengdar at eini almannahending, so sum sjúku, arbeiðsloysi, barnsburðri o.s.fr. Eitt undantak er veitingar eftir løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti. Tað eru familjur frá nógvum ymiskum sosialum støðum, ið fáa familjuískoyti, men felags fyri tær er, at tær hava lágar inntøkur og hava ikki innistandandi pening ella virðisbrøv.

Tað at hava lága inntøku er í sjálvum sær ikki at rokna sum ein almannahending, eins og hækkandi prísstøði heldur ikki er at rokna sum ein almannahending. Ein partur av familjunum, sum fáa familjuískoyti hava verið fyri eini almannahending, men tað eru eisini tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, eru lesandi o.s.fr. At príshækkingar eru í samfelagnum gevur ikki borgarum betri rætt til eina almannaveiting ella rætt til hægri almannaveiting.

Løgtingslógin um familjuískoyti fevnir um tvær ymiskar veitingar, sum eru ávikavist familjuískoyti og oljuískoyti. Familjuískoyti hevur verið veitt síðani januar 2016, meðan oljuískoyti einans bleiv veitt eitt stutt tíðarskeið í 2022. Seinasta freist at søkja um oljuískoyti var 30. november 2022. Niðanfyri verða familjuískoyti og oljuískoyti lýst hvør sær.

Familjuískoyti

Familjuískoyti er ein veiting, ið er tengd at inntøku, tali av børnum og parlagsstøðu. Familjur við lægstu inntøkunum fáa hægri upphæddir enn familjur við høgum inntøkum. Familjuískoyti er ein skattafrí veiting, ið verður útgoldin mánaðarliga.

Familjuískoyti verður sum nevnt bert veitt familjum, ið hava børn yngri enn 18 ár. Familjuískoyti er ein skattafrí veiting, sum í mesta lagi er 4.000 kr. um mánaðin, til tey, sum hava eitt barn, og stuðulin hækkar við 500 kr. um mánaðin fyri hvørt barni, sum er aftrat fyrsta barninum. Um familjan t.d. hevur trý børn, er stuðulin í mesta lagi 4.000 + 500 + 500, svarandi til 5.000 kr. um mánaðin.


Hægsta upphædd verður veitt, tá ein stakur hevur inntøkugrundarlag undir 120.000 kr. Veitingin lækkar stigvíst, so hvørt inntøkan hækkar, og dettur burtur, tá inntøkugrundarlagið fer uppum 290.000 kr. Eitt par fær fulla upphædd, tá inntøkugrundarlagið hjá báðum tilsamans

er lægri enn 220.000 kr. Familjuískoytið til pør dettur burtur, tá inntøkugrundarlagið fer uppum 390.000 kr. (410.000 kr. um tey hava 3 ella fleiri børn).


Inntøkugrundarlag er inntøkan seinastu 12 mánaðirnar. Talan er um eitt slag av rullandi skipan, og tað merkir, at hvønn mánað, áðrenn familjuískoyti verður útgoldið, verður kannað eftir, hvat inntøkan seinastu 12 mánaðirnar hevur verið.

Myndirnar niðanfyri vísa, hvussu familjuískoyti lækkar, so hvørt sum inntøkugrundarlagið hækkar.

Inntøkugrundarlag og familjuískoyti – stakur við tveimum børnum



Inntøkugrundarlag og familjuískoyti – par við tveimum børnum



Tað er inntøkan hjá umsøkjara, sum avger, hvussu stóra upphædd ein familja hevur rætt til. Hjá einum støkum uppihaldara verður tikið støði í inntøkuni hjá uppihaldaranum. Er viðkomandi í hjúnalagi ella parlagi verður inntøkan hjá makanum tikin við – eisini hóast makin ikki er

biologiskt foreldur at barninum. Inntøka og ogn hjá øðrum, sum búgva í húskinum – t.d. onnur familja, vaksin børn o.s.fr. – verður ikki tikin við.

Tað eru umleið 250 til 300 familjur, ið hvønn mánað fáa familjuískoyti. Harav eru 35 til 40 pør, meðan restin eru stakir uppihaldarar. Tað eru umleið 460 børn, sum búgva í familjum, ið fáa familjuískoyti. Tey, sum fáa familjuískoyti, koma frá ymsari sosialari bakgrund. Talan er bæði um familjur, ið fáa almannaveiting, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, lesandi o.s.fr. Felags fyri móttakararnar er, at tey hava lágar inntøkur, hava børn og hava ikki ogn.

Familjur, sum fáa familjuískoyti, hava eisini rætt til annan barnastuðul. Øll, sum hava børn, hava rætt til barnafrádrátt í skattinum. Inntøkan hjá teimum flestu, sum fáa familjuískoyti, er somikið lág, at tey hava rætt til fíggjarligt fríplás, um børnini eru í dagstovnaaldri. Stakir uppihaldarar hava rætt til barnaískoyti til stakar uppihaldarar. Harumframt fáa stakir uppihaldarar vanliga eisini barnagjald (sum ikki er ein almennur stuðul, men eitt gjald frá einum foreldri til hitt). Allar stuðulsskipanirnar nevndar omanfyri eru knýttar at barninum. Familjur og persónar, ið ikki hava børn yngri enn 18 ár, hava ikki rætt til hendan stuðulin.

Oljuískoyti
Við løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022 um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti samtykti Løgtingið at víðka skipanina, soleiðis at heimild var í eitt avmarkað tíðarskeið at veita eitt serligt oljuískoyti. Persónsskarin varð eisini víðkaður soleiðis, at vikið varð frá treytini, sum er galdandi í sambandi við familjuískoyti, um at móttakarar skulu hava børn yngri enn 18 ár. Tað merkti, at øll húski kundu søkja um oljuískoyti – eisini tey, sum ikki hava børn.

Treytin fyri at fáa rætt til oljuískoyti var, at umsøkjari kundi skjalprógva, at bústaðurin, sum viðkomandi er skrásettur at búgva, var upphitaður við olju.

Ein týðandi munur á familjuískoyti og oljuískoyti er, at við familjuískoyti er tað uppihaldari og møguligur maki, sum søkja. Við oljuískoyti vóru tað allir vaksnir persónar, skrásettir at búgva á bústaðnum, sum søktu. Tað vil siga, at inntøkan hjá øllum og ognin hjá øllum persónum 18 ár ella eldri varð tald við.

Oljuískoyti var eitt eingangsgjald á 10.000 kr., og øll, sum fingu játtað oljuískoyti, fingu somu upphædd. Markið fyri inntøkugrundarlag, var tað sama sum við familjuískoyti. Í húskjum við einum vaksnum persóni kundi inntøkugrndarlagið vera upp til 290.000 kr. og hjá húskjum við fleiri enn einum vaksnum kundi inntøkugrundarlagið vera 390.000 kr. (410.000 kr. um tað í húskinum búðu 3 ella fleiri børn).

Broytingarlógin um oljuískoyti kom í gildi 26. oktober 2022, og freistin at søkja var 30. november 2022.

Tað vóru umleið 760 húski, ið sendu umsókn, harav eitt sindur meira enn helvtin leyk treytirnar og fekk játtað oljuískoyti. Oljuískoytið varð játtað gott 400 húskjum, og samlaðu útreiðslurnar vóru góðar 4 mió. kr.

Av teimum, sum fingu játtað oljuískoyti, vóru umleið 47 % fólkapensjonistar.

Endamálið við oljuískoytinum var at veita eina skjóta fíggjarliga hjálp til húski við lágum inntøkum. Fyri at røkka endamálinum um, at hjálpin skuldi náa borgaranum skjótt, var neyðugt,

at lógin var einføld hjá Almannaverkinum at umsita, og tað er orsøkin til, at lógarásetingarnar í stóran mun byggja á objektivar treytir.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Eins og við uppskotinum um oljuískoyti er endamálið hesum uppskoti at minka um ringastu avleiðingarnar av prísvøkstrinum, ið hevur verið síðsta árið. Endamálið er at veita húskjum við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi, ein fíggjarligan stuðul við eini upphædd á 12.000 kr., sum verður útgoldin eina ferð. Harumframt hækkar vanliga familjuískoyti í tíðarskeiðinum 1. juni til 31. desember 2023, soleiðis at barnafamiljur við lágum inntøkum, og sum ikki hava ognir, fáa ein eyka fíggjarligan styrk.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær tvær ymiskar broytingar:

1. Húski kunnu søkja um eitt hjálparískoyti á 12.000 kr., sum verður veitt eina ferð.
2. Vanliga familjuískoyti hækkar í eitt avmarkað tíðarskeið við 750 kr. fyri hvørt barnið.

Hjálparískoyti

Uppskotið byggir í stóran mun á somu meginreglur sum oljuískoyti. Skipanin við oljuískoyti hevur givið nakrar royndir, og sostatt eru einstakir batar í hesum uppskoti í mun til løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022 um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (oljuískoyti). Eins og við oljuískoyti er í hesum uppskoti miðað eftir, at lógin er einføld at umsita, soleiðis at tað ikki gongur ov long tíð frá, at Almannaverkið móttekur umsóknina til ein avgerð er tikin.

Høvuðsbroytingin er, at hjálparískoyti ikki er treytað av, at húski hevur útreiðslur til olju til upphiting av bústaðnum, og tí hevur veitingin eisini fingið annað heiti. Tá undanfarni landsstýrismaður fyrireikaði uppskotið um oljuískoyti, var prísurin á olju hækkaður ógvusliga, og mett var, at húski, sum búðu í bústaði, vóru serliga hart rakt av príshækkingunum í samfelagnum. Prísurin á olju er nú lækkaður nakað aftur, meðan prísurin á gerandisvørum og øðrum vørum og tænastum heldur fram at hækka. Áhaldandi prísvøksturin leggur trýst á húsarhaldini, og tað rakar serliga tey við lágum inntøkum, sum ikki hava tøkan pening at standa ímóti við.

Hjálparískoyti er 12.000 kr., sum kann útgjaldast eina ferð.

Øll húski kunnu søkja um hjálparískoyti. Einastu treytir eru um inntøku og ogn hjá húskinum. Treytirnar um, at húskið skal hava børn ella búgva í bústaði, ið er upphitaður við olju, er ikki galdandi í sambandi við hjálparískoyti. Inntøkan og ognin hjá øllum vaksnum persónum í húskinum verður roknað saman, og um inntøka og ogn eru lægri enn ásettu mørkini, verður hjálparískoyti játtað.

Treytirnar fyri at fáa rætt til hjálparískoyti eru:

- Inntøkugrundarlag í mesta lagi:
  - Ein vaksin í húskinum: 290.000 kr.
  - Tvey ella fleiri vaksin í húskinum: 440.000 kr.

- Ogn í mesta lagi:

- Eitt ella tvey vaksin í húskinum: 50.000 kr.
- Trý ella fleiri vaksin: 70.000 kr.
- Ung undir 23 ár, ið búgva saman við foreldrum, kunnu eiga upp til 50.000 kr., sum ikki er at rokna sum ogn.

Markið fyri inntøkugrundarlag hjá støkum er í hesum uppskoti óbroytt í mun til oljuískoyti, meðan markið hjá húskjum, har tað búgva fleiri enn ein vaksin, er hækkað. Tað vísir seg, at tað eru ógvuliga fá húski, har tað búgva fleiri enn ein vaksin, sum hava rætt til oljuískoyti ella familjuískoyti.

Í sambandi við oljuískoyti vóru tvey ymisk mørk hjá húskjum, ið telja fleiri enn ein vaksnan. Í húskjum við 0, 1 ella 2 børnum var markið 390.000 kr., meðan markið í húskjum við 3 ella fleiri børnum var 410.000 kr. Hetta er nú broytt til at vera eitt og sama mark, sum er nakað hægri. Fyri at fáa rætt til hjálparískoyti skal inntøkugrundarlagið hjá húskjum við fleiri enn einum vaksnum í mesta lagi vera 440.000 kr. Hetta er uttan mun til talið av børnum.

Tað vóru einstakar familjur, sum fingu sýtt umsókn um oljuískoyti, tí eitt heimabúgvandi 18 ára gamalt barn hevði barnauppsparing á nakrar 10 túsund krónur, og hetta hevði við sær, at foreldur samlað høvdu ogn hægri enn markið á 50.000 kr. Tí verður við hesum uppskoti eitt undantak sett inn lógina, soleiðis at ung undir 23 ár, sum búgva hjá einum ella báðum foreldrum, kunnu hava ogn upp til 50.000 kr., sum ikki telur við, tá samlaða ognin hjá húskinum verður roknað.

Familjuískoyti
Uppskotið hevur við sær, at í tíðarskeiðinum 1. juni til 31. desember 2023 hækkar familjuískoytið við 750 kr. fyri hvørt barni um mánaðin. Hendan broytingin hevur við sær, at tær familjur, sum í dag fáa familjuískoyti, í eitt tíðarskeið fara at fáa hægri upphædd útgoldna. Ein partur av teimum, sum fáa familjuískoyti, hava eisini fingið oljuískoyti og fara eisini at fáa hjálparískoyti. Men tað eru eisini nøkur, sum fáa familjuískoyti, sum ikki hava rætt til oljuískoyti ella hjálparískoyti. Hetta er tí, at familjuískoyti er tengt at parlagsstøðu, meðan oljuískoyti og hjálparískoyti er tengt at inntøku og ogn hjá samlaða húskinum. Til dømis. ein uppihaldari, sum býr inni hjá egnum foreldrum ella hevur vaksin heimabúgvandi børn, kann hava rætt til familjuískoyti, men um onnur í húskinum hava inntøku, so gongur tað út yvir rættin til oljuískoyti ella hjálparískoyti (oljuískoyti er harumframt treytað av, at bústaðurin er hitaður við olju).

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógvar familjur í januar 2023 fingu familjuískoyti, og hvussu nógv børn hesar familjur hava. Flestu familjurnar, sum fáa familjuískoyti, hava eitt barn, men tað eru eisini familjur, ið hava 2, 3 ella 4 børn. Áður hava eisini verið familjur við 5 børnum, sum hava fingið familjuískoyti.

Gift/samlivandi, sum í januar 2023 fingu familjuískoyti

1 barn	18
2 børn	11
3 børn	7
4 børn	2

Stakir uppihaldarar, sum í januar 2023 fingu familjuískoyti

1 barn	135
2 børn	71
3 børn	30
4 børn	6

Í yvirlitinum niðanfyri eru dømi um upphæddir, sum verða veittar í familjuískoyti, skift á ymsar inntøkubólkar.

Familjuískoyti um mánaðin til gift og samlivandi, eftir inntøku

	1 barn		3 børn	
Inntøkugrundarlag	Galdandi	Frameftir	Galdandi	Frameftir
220.000	4.000	4.750	5.000	7.250
250.000	3.400	4.150	4.400	6.650
280.000	2.800	3.550	3.800	6.050
310.000	2.200	2.950	3.200	5.450
340.000	1.583	2.333	2.500	4.750
370.000	958	1.708	1.750	4.000
400.000		-	1.000	3.250


Familjuískoyti um mánaðin til stakar uppihaldarar, eftir inntøku

	1 barn		3 børn	
Inntøkugrundarlag	galdandi	Frameftir	galdandi	frameftir
120.000	4.000	4.750	5.000	7.250
150.000	3.400	4.150	4.400	6.650
180.000	2.800	3.550	3.800	6.050
210.000	2.200	2.950	3.200	5.450
240.000	1.583	2.333	2.500	4.750
270.000	958	1.708	1.750	4.000
300.000		-	-	-

At familjuískoyti er tengt at inntøku hevur við sær, at skipanin virkar sum ein øktur marginalskattur. At skipanin við familjuískoyti er skrúva saman, sum hon er, er við til, at tað hjá nøkrum familjum ikki lønar seg at fáa hægri inntøku. Skulu varandi broytingar gerast í skipanini við familjuískoyti, so hevur tað týdning, at tað verður hugsað saman við øðrum stuðulsskipanum og skattaskipanini. Broytingin viðvíkjandi familjuískoyti í hesum uppskotið er fyribils og er galdandi til ársenda 2023.

Myndin niðanfyri vísir sambandi millum arbeiðsinntøku og tøka inntøku hjá støkum uppihaldara við ávikavist einum barni og trimum børnum. Eisini vísir myndin tøku inntøkuna hjá løntakara, sum ikki hevur børn. Dømini í myndini eru við støði í kommunuskattaprosenti, barnafrádrátti og vøggustovugjaldi fyri eitt barn í Tórshavnar kommunu.

Tøk inntøka um árið hjá støkum uppihaldara í Tórshavnar kommunu, aftan á skatt, arbeiðsmarknaðargjøld og gjald fyri eitt barn í vøggustovu.



Viðm.: Í døminum við 3 børnum eru børnini 2, 5 og 8 ár (barnafrádrátturin til børn yngri enn 7 ár er 2.700 kr.).

Myndin omanfyri er íroknað allan barnastuðul. Við barnastuðli er at skilja, barnafrádráttur í skattinum, barnaískoyti til stakar uppihaldarar og barnagjald (sum ikki er ein stuðul frá tí almenna, men eitt gjald frá einum foreldri til hitt).

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis. Landsstýrið metir tað vera átrokandi, at fíggjarliga sperdar familjur fáa hjálp so skjótt sum gjørligt, og fyri at uppskotið skal verða viðgjørt í hesi tingsetuni, er avgerð tikin um ikki at senda uppskotið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær øktar útreiðslur til familjuískoyti í fíggjarárinum 2023. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2023, sum er til viðgerðar í Løgtinginum, er ikki lagt upp fyri hesum útreiðslum, og tí verður neyðugt við einum broytingaruppskoti til fíggjarlógaruppskotið.

Umsóknarfreistin til hjálparískoyti er 30. juni 2023, og væntast allar umsóknir at verða avgreiddar í árinum. Somuleiðis verður hækkingin í familjuískoytinum bert galdandi í 2023, og lógaruppskotið fær sostatt ikki avleiðingar fyri komandi fíggjarlógir.

Familjuískoyti

Hækkingin í familjuískoytinum er 750 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið. Tað eru umleið 460 børn, sum búgva í familjum, ið fáa familjuískoyti, og hækkingin hevur sostatt við sær øktar útreiðslur til familjuískoyti á 345.000 kr. fyri hvønn mánað, hækkingin er galdandi. Sambært hesum uppskoti verður hækkingin galdandi í 7 mánaðir, svarandi til eina meirútreiðslu til familjuískoyti upp á uml. 2,4 mió. kr.

Hjálparískoyti

Tað vóru gott 400 húski, ið fingu játtað oljuískoyti. Oljuískoyti var 10.000 kr., og útreiðslurnar vóru sostatt góðar 4 mió. kr. Hjálparískoyti er ásett til 12.000 kr. Flest øll tey, sum hava fingið játtað oljuískoyti, hava sannlíkt eisini rætt til hjálparískoyti. Hjálparískoyti til 400 húski merkir sostatt ein útreiðsla til høvuðskontuna familjuískoyti á umleið 4,8 mió. kr. Men málbólkurin er víðkaður, og tað væntast at verða nakað fleiri játtanir til hjálparískoyti enn tað vóru til oljuískoyti.

Munur millum hjálparískoyti og oljuískoyti

- Treytin um, at bústaðurin ikki skal vera hitaður við olju, er ikki galdandi við hjálparískoyti,
- Markið fyri inntøkugrundarlag er hækkað úr ávikavist 390 og 410 tús. kr. upp til 440 tús. kr.,
- Hjá persónum yngri enn 23 ár er ogn upp til 50.000 kr. undantikin.

Tað ber ikki til at meta um, hvussu nógv fleiri húski fara at fáa rætt til hjálparískoyti. Verður samlaða talið 600 húski, verður útreiðslan til hjálparískoyti 7,2 mió. kr. Verða tað 800 húski verður útreiðslan 9,6 mió. kr.

Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

Tað ber ikki til at siga, í hvussu stóran mun lógaruppskotið fer at stuðla undir prísvøkstri. At eini 500 ella 800 húski fara at fáa 12.000 kr. meira at brúka, og at familjuískoyti hækkar í eitt tíðarskeið, økir í ein ávísan mun eftirspurningin eftir vørum og tænastum. Men av tí at talan er um eina tíðaravmarkaða broyting, so avmarkar tað avleiðingarnar fyri búskapin.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Tað kann væntast, at viðgerðin av umsóknum um hjálparískoyti fer at líkjast viðgerðini av umsóknum um oljuískoyti. Almannaverkið fekk umleið 770 umsóknir um oljuískoyti (harav umleið 400 vórðu játtaðar). Tvey fólk hava arbeitt burturav við viðgerð av umsóknum, og tað hevur tikið meira enn 3 mánaðir at avgreiða tær flestu umsóknirnar.

Broytingin, sum viðvíkur vanliga familjuískoytinum (hækkingin á 750 kr.), hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar.

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

At familjuískoyti er tengt at inntøku hevur við sær, at skipanin virkar sum ein øktur marginalskattur. At skipanin við familjuískoyti er samansett, sum hon er, er við til, at tað hjá nøkrum familjum ikki lønar seg at fáa hægri inntøku. At hava inntøkutreytað familjuískoyti og inntøkutreytað gjald fyri dagstovn saman við einum progressivum skattastiga merkir, at ein familja við lágari arbeiðsinntøku kann hava hægri tiltøkupening enn ein familja við hægri arbeiðsinntøku. Hetta kann hava við sær, at nøkur halda seg aftur á arbeiðsmarknaðinum.

Hækkingin í familjuískoytinum, sum hetta lógaruppskotið hevur við sær, er tó bert galdandi í nakrar mánaðir og fær tí ikki langtíðarávirkan á arbeiðsútboðið .

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri tey húski, sum fáa rætt til hjálparískoyti ella familjuískoyti. Tað væntast at vera ymiskir samfelagsbólkar, sum fara at fáa ágóðan av broytingunum. Láginntøkubólkar eru serliga lesandi, fólka- og fyritíðarpensjonistar, stakir uppihaldarar, ið arbeiða niðursetta tíð o.o. Men nøkur av hesum eru partur av størri húski, og í tann mun, at onnur í húskinum hava inntøku ella ogn, dettur rætturin til oljuískoyti burtur.

Av teimum, sum fingu játtað oljuískoyti, var ein lítil helvt fólkapensjonistar. Tað kann væntast, at við hjálparískoyti verða tað lutfalsliga líka nógvir fólkapensjonistar.

Tað eru barnafamiljur, sum fáa ágóðan av hækkingini í familjuískoyti.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrismanninum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja

Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1,
Við ásetingini verður heimild givin at veita hjálparískoyti til húski, ið annars lúka treytirnar í hesi lógini.

Til nr. 2, 4, 6 og 7
Ásetingarnar hava til endamáls at víðka verandi ásetingar um oljuískoyti til eisini at fevna um hjálparískoyti.

Til nr. 3
§ 2 c, stk. 1 ásetir, at hjálparískoyti er ein føst upphædd, ið er 12.000 kr. Hjálparískoyti kann bert útgjaldast eina ferð til hvørt húski.

§ 2 c, stk. 2 og 3 áseta hægst møguliga inntøkugrundarlag fyri at fáa rætt til hjálparískoyti. Húski, ið telur ein vaksnan, sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag 290.000 kr., kann fáa hjálparískoyti. Hetta er uttan mun til, um tann vaksni hevur børn ella ikki hevur børn.

Húski, ið telur tvey ella fleiri vaksin, og sum í mesta lagi hevur inntøkugrundarlag 440.000 kr., kann fáa hjálparískoyti.

Tá tað í hesum lógaruppskoti stendur "vaksin", tá er talan um persón, ið er 18 ár ella eldri.

§ 2 d ásetir, at familjuískoyti hækkar við 750 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið. Treytirnar í § 1 eru galdandi, og hækkingin fevnir sostatt um tey børn, sum eru grundarlag undir verandi familjuískoyti.

Til nr. 5
§ 8 a, stk. 1, 4 og 5 verður við hesi áseting víðka til umframt oljuískoyti eisini at fevna um hjálparískoyti. Stk. 2 er óbroytt.

§ 8 a, stk. 3 ásetir, at umsókn um hjálparískoyti skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 30. juni 2023. Bert umsóknir, ið eru Almannaverkinum í hendi áðrenn freistina, kunnu verða játtaðar.

Til nr. 8
Ein persónur upp til 23 ár, sum er skrásettur at búgva saman við einum ella báðum foreldrum, kann eiga upp til 50.000 kr., sum ikki eru at rokna sum ogn. Hevur ein persónur í hesum aldrinum t.d. 70.000 kr. innistandandi, tá eru tær fyrstu 50.000 kr. ikki at rokna sum ogn, meðan restin upp til 70.000 kr., svarandi til 20.000 kr., eru at rokna sum ogn.

Tá tað stendur "upp til 23 ár", merkir tað til og við 22 ár.

Inntøka og ogn hjá børnum, yngri enn 18 ár, telja ikki við í sambandi við umsóknir sambært løgtingslóg um familjuískoyti, og tað er eisini galdandi sambært hesi løgtingslóg.

Til § 2
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almanna- og mentamálaráðið, 7. mars 2023.

Sirið Stenberg
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur